# Føroya Lærarafelag er reyvin í fjórðu deild

**- Føroyski fólkaskúlin er eitt lasafar og Føroya Lærarafelag er ein vissur likamspartur í fjórðu deild, heldur Óli Breckmann. Hann vil eisini hava, at video upptøkutól verða sett upp í øllum skúlastovum fyri at vita, hvat kanska er galið við lærarunum, um tann næsta Pisa kanningin verður líka vánalig, sum tann fyrsta var**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Føroya Lærarafelagi er ein vissur likamspartur av fjórðu deild og fólkaskúlin er eitt merkiligt lasafar.

Óli Breckmann, løgtingsmaður, høgdi til høgru og vinstru, tá ið Løgtingið hevði føroyska fóllkaskúlan til umrøðu mikudagin.

Heidi Petersen, løgtingskvinna, spurdi landsstýrismannin í skúlamálum, hvussu hann ætlaði at fyrihalda seg til úrslitið av Pisa kanningini.

Óli Breckmann kallaði skúlan eitt merkiligt lasafar og tað verður ikki talingur um at brúka meiri pening upp á hetta lasafarið.

– Ein gamal bilur má burtur og vit mugu í holt við at fáa ein nýggjan bil. Eitt gamalt skip kann ikki blíva við at verða umvælt fyri fleiri milliónir, tí tað søkkur fyrr ella seinni.

– Og hendan brigadan av serfrøðingum, sum kallast Føroya Lærarafelag hava 46 tilráðingar, men eg hoyrdi ongantíð, at vanligi limurin í Lærarafelagnum skal sleppa at royna seg í fríari kapping ímóti øðrum limum í Føroya Lærarafelag.

– Tey halda hondina yvir hvørjum øðrum og kann eg siga mína meining um Føroya Lærarafelag er tað ein vissur likamspartur í fjórðu deild, ljóðaðu seinastu skotriðini frá Óla Breckmann um felagið hjá føroysku lærarunum.

Men hann var ikki heilt liðugur við sjálvan fólkaskúlan, tí hann mælti eisini til, at nakrar milliónir verða brúktar til at seta videoupptøkutól upp í hvørjari einastu skúlastovu fyri at vita, hvat kanska var galið við lærarunum, um so er, at úrslitið av næstu Pisa kanning verður líka vánaligt, sum úrslitið av teirri fyrstu, sum varð kunngjørt fyrr í ár.

Hann vísti á, at Løgtingslimir hava upptøkutól á sær hvønn einasta dag og hann helt ikki, at tað var meiri enn rímiligt, at ein almennur stovnur sum fólkaskúlin, eisini toldi tað.

### Kunnu ikki leypa á leistum

Annars vísti Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður á, at í næsta mánað er ætlanin at hava aðalorðaskiftið í Løgtinginum um fólkaskúlan. Síðani verður málið tikið til politiska viðgerð og neyðugur peningur settur av.

Annars vísti hann á, at næsta ár er ætlanin at játtanin til fólkaskúlan skal økjast tilsamans 18 milliónir.

Andreas Petersen vísti á, at hetta er ikki eitt mál, har vit kundi loypa á leistum, uttan at hugsa væl og virðiliga um tey tiltøk, vit seta í verk.

Høgni Hoydal sigur, at tað er skeivt, at játtanin til fólkaskúlan er ikki hækkað, tí hækkingar til Skúlabókagrunnin hava onki við fólkaskúlan at gera.



*Óli Breckmann skeyt við skørpum mikudagin. Hann legði bæði eftir Lærarafelagnum og fólkaskúlanum og hann vil hava videouppøkutól sett í hvørji einastu skúlastovu*

Bæði Heðin Zachariasen, Kaj Leo Johhannesen hildu, at tað var neyðugt at tað er ikki vist at hægri játtanir í sær sjálvum, loysa trupulleikan, tí teir mettu, at tað mátti eisini kannast eftir væl og virðiliga, hvat vit fáa fyri pengarnar.

Hergeir Nielsen undraðist á, at Óli Breckmann ikki varð átalaður fyri at kallað Føroya Lærarafelag eitt so niðrandi sum afturpartin í fjórðu deild.

Sverri Midjord helt, at tíðin varð kanska komin til at dagføra lærararnar í fólkaskúlanum til at lúka dagsins krøv.

# Uppskot um at gera statskvett í Føroyum

**– Tað er okkurt ramlandi galið í heysinum á teimum, sum manna javnstøðunevndina, sigur Hendrik Old. Tórbjørn Jacobsen kallar tað idiotiskt. Men Lisbeth Petersen heldur, at hetta sigur alt um støðið hjá mannfólkunum í Løgtinginum**

JAVNSTØÐA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*





*- Hevur Javnstøðunevndin onki at fiffla við, enn at koma við so nøkrum so idiotiskum, er onki at gera enn at avtaka hana ongantíð ov skjótt, heldur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður. Eisini Hendrik Old heldur, at stundin er komin at umhugsa framtíðina hjá nevndini*

– Hetta er eitt uppskot um at gera regulert statskvett í Føroyum

– Hetta er at torpedera demokratiið í Føroyum.

Tónalagið var óvanliga hvast í Løgtinginum mikudagin.

Løgtingið umrøddi javnstøðu ímillum kvinnur og menn og tað plaga tingfólk hava hava greiðar meiningar um. Tað høvdu teir eisini mikudagin, tá ið Heidi Petersen spurdi Løgmann, hvat hann ætlaði at gera við seinasta uppskotið frá javnstøðunevndini og nevndini, sum arbeiðir fyri øktum kvinnuligum leikluti í politikki.

Uppskotið snýr seg um, at tingmenn skulu siga tingsessin frá sær og lata kvinnuligu varalimirnar taka sætið á tingi ístaðin í einar tvær ella fýra vikur.

Tinglimir vóru ójavnir á máli um uppskotið, men tað er ikki ofta, at orðavalið er so eirindaleyst, sum tað var hesuferð, serliga hjá summum av teimum, sum vóru ímóti.

### Uppskot um regulert statskvett

Hendrik Old helt, at tað má vera okkurt ramlandi galið í heysinum á teimum fólkum, sum komu við hesum, tá ið lagt verður upp til at gera statskvett í einum landi.

Hann helt nevniliga, at tað er eitt regulert uppskot um eitt statskvett, tá mælt verður til, at koyra meirilutan av teimum valdu tinglimunum frá fyri at fáa nøkur heilt onnur á ting ístaðin.

Hann helt eisini, at skal hetta vera ætlanin, eiga vit at umhugsa at strika játtanina til javnstøðunevndina.

– Hetta er alvorligt. Hetta er alvorligt, sum fyrigongur í heysinum á hesum fólkunum, segði Hendrik Old.

Eisini Tórbjørn Jacobsen var eirindaleysur og greiður í sínari niðurstøðu.

– Hevur javnstøðunevndin onki annað at fiffla við, enn at koma við so idiotiskum og demokratiskt undirgravandi virksemi, er bara eitt hjá tinginum at gera og tað er at avtaka bæði Javnstøðunevndina og javnstøðulógina og tað ongantíð ov skjótt.

Hann kallaði hetta at torpedera demokratiið og tað góðtók hann ikki og hann mælti heldur kvinnum til at stilla upp, so tí áttu tær helvtina av Løgtinginum.

Eisini aðrir løgtingsmenn vóru ímóti ætlanini.

Heðin Zachariasen helt, at hetta var láturligt, tí vit fáa eina fatan av, at kvinnurnar í Føroyum eru niðurbundnar, sum ikki sluppu at ganga í skúla og ikki sluppu at útbúgva seg. Men veruleikin er, at vit hava nógvar vælútbúnar kvinnur tó at tær eru nakað fáar í Løgtinginum.

Eisini Gerhard Lognberg helt, at hetta var ein syndarligur spurningur, tí kvinnur hava sama møguleika, sum menn, at stilla upp, men tær kunnu ikki tvingast at gera tað.

Páll á Reynatúgvu helt, at tað, sum kvinnur vildu hava minst av øllum, var kávalótir og fjant og fjas skipanir, sum ikki byggja á veruliga fólkaræðið og skipanina, vit velja Løgtingið eftir.

Eisini hann helt, at flokkarnir eiga at taka málið í størri álvara innanfloks og kanska broyta valskipanina so at tað verður lættari hjá kvinnum at verða valdar

Kristian Magnussen helt ikki, at lóggevandi Løgtingið kundi brúkast til hugskotsleikir og sýningar.

– Er virðingin fyri Løgtinginum ikki 100%, so veit eg ikki, hvar vit enda.

Hann helt, at tað kundi eisini hugsast, at eitt slíkt uppskot endaði í einum politiskum uppreistri, tí tey kundu samtykt hvat sum helst.

Hann segði, at trupulleikin liggur í valskipanini. Aðrastaðni eru tað flokkarnir, sum sjálvi gera av, hvør skal standa ovast á vallistunum og sostatt verða fyrst vald.

Bill Justinussen tók undir við at fáa fleiri kvinnur upp í politikk, men hann helt, at hetta var ómøguligt at gjøgnumføra. Hann undraðist á, at ongin hevði skotið upp, at øll fingu tvær atkvøður, so at vit skuldu velja ein mann og eina kvinnu, hvørja ferð val var.

### Frískligt og áhugaverd roynd

Løgmaður helt, at uppskotið var frískt og áhugavert og kundi verið eitt hugskot til at fingið meiri javnvág ímillum kynini í Løgtinginum. Hann helt, at størsta forðingin fyri javnstøðu, er hugburðurin, men tað tekur tíð at broyta.

Høgni Hoydal helt, at hetta er eitt slag av sýning, ella pallborðsfundi, har vit lata kvinnuligar varamenn um at koma á Løgting í 10 dagar og tað helt hann hevði verið ein áhugaverd roynd.

- Hetta hevði verið eitt fint tiltøk, tí tað krevjast serstøk og ógvuslig tiltøk fyri at gera vart við trupulleikan, tí støðan viðvíkjandi javnstøðu er margháttlig í Føroyum.

Kári P. Højgaard helt, at uppskotið var fint og hann tók fult undir við hesum, tí vit hava botnmet í kvinnuligari luttøku í politikki. Og framdu vit hetta tiltakið, høvdu vit í hvussu so er einaferð komið á breddan sum undangonguland á javnstøðuøkinum.

### Sigur alt um støðið

Kvinnuligi løgtingslimirnir vóru ikki sørt illa við av orðavalinum hjá tingmonnunum.

Lisbeth L. Petersen helt, at hetta segði alt um støðið í Løgtinginum.

– Nú skilja vit kanska tær kvinnur betri, sum ikki vilja stilla upp, tá ið tað verður arbeitt á so lágum støði.

Hon helt, at tað var neyðugt, at hvør flokkur arbeiddi meiri við javnstøðumálum.

Kortini helt hon, at javnstøða kann fremjast øðrvísi enn at kvinnur koma inn í lóggevandi tingið at viðgera lógarmál. Hon mælti heldur til, at skipa verður aftur fyri kvinnutingi.

Annita á Fríðriksmørk vísti á, at onkustaðni skal annaðhvørt valevni vera kvinna. Og hon spurdi um tað var meiri demokratiskt at áseta, at eitt ávíst tal av tingmonnum skal vera úr ávísum økjum í landinum.

– Fólkaræðið sær út, sum vit sjálvi vilja hava tað at síggja út, legði hon afturat.

Heidi Petersen ásannaði, at tá ið hugburðurin hjá monnunum var so negativir, vísir tað bara, at vit eru komin ótrúliga stutt á hesum øki.